# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

*Á móttøkuni fríggjadagin fekk Edward, høgrumegin á myndini, blómur frá Viggo Christiansen, deildarleiðara fyri el og vatn hjá Tórshavnar Kommunu, Viggo segði eisini nøkur orð og takkaði Edwardi fyri sera gott samstarv*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



Edward í Puntabyrgi:

## Kend býarmynd hvørvur

**Fríggjadagin 26. mars var seinasti arbeiðsdagur hjá Edwardi í Puntabyrgi á gøtuljósdeildini hjá Tórshavnar Kommunu. Í hesum sambandi var móttøka fyri starvsfeløgunum á deildini í Tórfinsgøtu**



*Starvsfelagar á móttøkuni. Hildibrandur Olsen, arbeiðsmaður, Esmar Andreasen, arbeiðsformaður, Jákup Joensen, deildarleiðari fyri gøtuljós, og Marius Müller, tekniskur stjóri*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Eftir at hava arbeitt í 25 ár í Havnini fór Edward í Puntabyrgi, sum er ættaður úr Puntabyrgi í Trongisvági, seinasta fríggjadag suður aftur til Trongisvágs at búgva. Hann verður 67 ár í mai.

Edward var ein býarmynd í Havn. Hann var altíð at síggja í býnum, tá t.d. ein ljóspera var brostin á veganetinum hjá Tórshavnar Kommunu, var hann skjótur at klúgva upp í ljósmastrina og skifta hana.

Edward kom til Havnar at arbeiða í september 1979. Fyrstu árini á byggivirkinum hjá bróðurinum Finn í Puntabyrgi og seinastu 16 árini á deildini, sum umsitur gøtuljósini hjá Tórshavnar Kommunu.

Edward í Puntabyrgi er føddur í Trongisvági 26. mai 1937.

Foreldrini vóru: Nicolina, ið var ættað úr Puntabyrgi, og Kalli Hansen, ið var sonur kenda havnarmannin ið varð kallaður "Hans á bakka". Tey vóru átta systkin.

Foreldrini og trý systkin eru farin.

Hini systkini eru: Gunvør og Hansa, ið búgva í Danmark, Finn býr í Hoyvík og Kalli býr í Klaksvík.

Edward vaks upp millum dreingirnar í Puntabyrgi, ið nú eru spajddir runt á klótuni.

Á ungum árum var Edward í Danmark, har hann tók handilsskúlaprógv á Niels Brock. Heimafturkomin starvaðist hann á skrivstovuni hjá Kjølbro á Skála Skipasmiðju. Av heilsuávum mátti hann gevast við hesum innanduraarbeiði.

Sum barn var heilsan ikki góð, hann var ringur av astma. Men sum hann vaks og eldist, bardi hann hetta av sær.

Onkran túrin var hann til skips, var við eingilsmonnum og við garnabáti í Íslandi.

Hann var í fleiri ár í Grønlandi hjá GTO, har hann t.d. starvaðist sum linjumaður.

Lættur á sær hevur hann altíð verið serstakliga góður bakkamaður.

Eisini var hann koyrilærari í mong ár í Suðuroy.

Edward hevur altíð verið góður við Suðuroynna. Eftir 25 ár norðanfjørðs flytur hann nú suðuraftur. Hann hevur gjørt sær barnaheimið í Trongisvági í stand, so har er sera hugnaligt.

Edward er serstakliga hjálpsamur og altíð klárur við eini hjálpandi hond, tá á stendur, og kenna vit hann rætt, gongur hann ikki leingi fyri einki.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Arnold K. Henriksen:

## 40 ár á Fiskirannsóknarstovuni



*Arnold K. Henriksen uttan fyri kjallarahurðina í skansapakkhúsinum, har Fiskirannsóknarstovan var fyri 40 árum síðan*

Arnold K. Henriksen hevur 1. apríl starvast í 40 ár á Fiskirannsóknarstovuni.

Í hesum tíðarskeiði hevur hann luttikið í at kalla øllum tættum innan fiskiroyndir og fiskifrøði og hevur verið nógv við fiskirannsóknarskipunum Jens Chr. Svabo og Magnus Heinason.

Hann var t.d. við, tá trolingin á landleiðini byrjaði við Jens Chr. Svabo og øðrum skipum, hann var við, tá royndirnar at fiska laks við línu byrjaðu undir Føroyum, hann var við til fyrstu royndirnar við rúsum eftir hummara undir Føroyum, hann var eisini við til at kanna gýtingarøkið hjá kalva norður av Føroyabanka og mangt, mangt annað.

Hann hevur umframt øll árini havt álitisuppgávuna at greina aldurin á fiski úr nytrum og roðslum. Í arbeiðinum hevur hansara partur ongantíð ligið eftir

Áðrenn hann kom í starv á Fiskirannsóknarstvuni, sigldi hann við ymsum skipum, m.a. við Ternuni sum 14 ára gamal, við skúlaskipinum Danmark, danska fiskirannsóknarskipinum Dana, Tjaldrinum og DR. Aleksandrinu.

Vert er at nevna, at í ár eru tað 50 ár síðan, hann var við Danu, tá hon leitaði eftir sildayngli við Føroyar við m.a. Jákup Sverra Joensen sum kanningarleiðara.

Arnold er havnarmaður, sonur Elisabeth og Palla Henriksen úr Havn. Hann var giftur við Jonleyg Dalbú úr Fuglafirði, sum doyði í 1995. Børnini eru Ann, Palli og Bogi.

Í sambandi við dagin verður almenn móttøka á Fiskirannsóknarstovuni 1. apríl frá kl. 15–17.

AWI BOATS Service Sp/f:

## 4-mannafar til Danmarkar



*Báturin inn á verksmiðjuni hjá AWI BOATS í Runavík. Áhugin uttanlands fyri føroyskum 4-mannaførum úr glastrevjum er vaksandi*

*Mynd: AWI BOATS*

TÍÐINDASKRIV

Áhugin fyri føroyskum 4-mannaførum úr glastrevjum uttanlands er vaksandi.

Í vikuni avskipaði AWI BOATS Service Sp/f úr Runavík eitt 4-mannafar til Danmarkar.

Av virkinum verður sagt, at áhugi er fyri føroyska bátinum, og at áhugin er øktur seinastu tíðina.

### 60 ár

Í dag, 30. mars, verða tvíburarnir Bjarni og Páll Skorastein, Leirvík, 60 ár.

Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum leygardagin 3. apríl frá kl. 18.00.

### Dagurin

**30. mars. Kvirinius,** deyður umleið ár 120. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

## Almenn móttøka

Í sambandi við, at Arnold Henriksen,
biologassistentur, 1. apríl hevur verið 40 ár
í starvi á Fiskirannsóknarstovuni,
verður almenn móttøka hósdagin 1. apríl 2004
frá kl. 15.00 til 17.00.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Tórshavn